FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

## Lærarar til FHS

Søkt verður eftir lærara ella lærarum til hesar tímar í Tórshavn:

| | | |
|---|---|---|
| **Samfelagslæru/Fiskivinnu C** | (6 t/v) | á dagskúlanum |
| **Marknaðarførslu C** | (8 t/v) | á dagskúlanum |
| **Marknaðarførslu C** | (3 t/v) | á kvøldskúlanum |

Starvið er tíðaravmarkað frá 29. januar til 27. juni 2007.

**Løn:**
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsøknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2007. Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo ella sp@hsh.fo.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**

# KAGGIN

Landsins besta Country/Rock
Pop orkestur, í landsins besta
LIVE stað.. KAGGIN

**Fríggjakvøldið 5. jan**
**Leygarkvøldið 6. jan**



**SPAÐAR 5**

## Spennandi avbjóðingar í Dátueftirlitinum

*Kundi tú hugsað tær eitt starv mitt í meldrinum? Og vilt tú vera við til at mynda Dátueftirlitið í framtíðini?*
*Dátueftirlitið søkir eftir løgfrøðingi og skrivstovufólki at byrja skjótast gjørligt.*

**Løgfrøðingur**
Søkt verður eftir løgfrøðingi at byrja skjótast til ber.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um málsviðgerð, gerð av vegleiðingum og kunnandi tilfari á økinum, fyrireiking og luttøku á ráðsfundum umframt luttøku í norðurlanda samstarvi á økinum.
**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv.
**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni og skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst. Royndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum eru ein fyrimunur. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt mál og harumframt vera kønir í enskum máli.
**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.
**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu innan 24. januar 2007 sendast til:
Dátueftirlitið
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn
*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ingunn Eiriksdóttir, stjóra, tlf. 514763.*

**Skrivstovufólk**
Søkt verður eftir skrivstovufólki at arbeiða hálva tíð.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um vanligar skrivarauppgávur.
**Faklig førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving.
**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni og góðan kunnleika til føroyskt mál. Umsøkjarar skulu kunna tola skiftandi arbeiðsuppgávur og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Royndir innan almenna umsiting er ein fyrimunur.
**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarflokki II ella III.
**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu innan 24. januar 2007 sendast til:
Dátueftirlitið
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn
*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ingunn Eiriksdóttir, stjóra, tlf. 514763*

*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Innlendismálaráðið. Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um. Avgreiðsluskrivstovan røkir dagliga virksemið hjá Dátueftirlitinum. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum. Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um, bert fer fram í samsvari við lógina. Av øðrum uppgávum kunnu nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, viðgerð av fráboðanum, umsóknum um loyvir og luttøku í millumtjóða samstarvi á økinum. Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum. Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða løggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

DÁTUEFTIRLITIÐ · TINGANES · POSTRÚM 64 · 110 TÓRSHAVN · TEL 314763 · POST@DATUEFTIRLITID.FO · WWW.DATUEFTIRLITID.FO